VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Upp í hvassan vind av norði. Skýggjað og kavaælingur. Hitin um 5 kuldastig



Veðrið í leygardagin:
Upp í hvassan vind av norði, spakuliga minkandi niður í andøvsgul ella strúk ´í vindi. Skýggjað og kavaælingur. Hitin um 5 kuldastig



Veðrið sunnudagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, sum lækkar niður í útnyrðing og minkandi niður í gul til stívt andøvsgul. Okkurt kavaælið, annars klárviðrað. Hitin millum 2 og 5 kuldastig.

Veðrið nýggjársaftan og nýggjársdag:
Stívt andøvsgul upp í hvassan av vestri ella útsynningi, sum lækkar niður í sunnan. Skýggjað og í skiftum regn. Hitin økist til millum 2 og 5 stig.

Kirkjurnar fyltust

Tað letur ikki til at føroyingar hava gloymt veruliga endamálið við jólunum, tí hóast gávures og jólastress mundi raka tey flestu í ávísan mun dagarnar fram til tann 24., so sótu fólk fjølment í landsins kirkjum um jólini

Rúnar Reistrup

Jólatíð er bæði stuttlig og strævin tíð - ikki minst hjá prestum, sum um jólini skulu nøkta ein serliga stóran tørv á kirkjutænastum.

– Tað er altíð hugaligt at standa framman fyri fullari kirkju, sigur Heri Joensen, prestur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi, sum helt tríggjar kirkjuguðstænastur jólaaftan, allar fyri fullum húsum.

Tað er einki nýtt at kirkjurnar fyllast jólaaftan og jóladag, men at Vesturkirkjan eisini var á tremur til guðstænastuna 2. jóladag sær Heri Joensen sum eitt boð um at talið á kirkjugestum sum heild er vaksandi.

– Skal eg meta eftir hvat eg síggi til guðstænastur sunnudagar, so eru fólk farin at ganga meira í kirkju hesa seinastu tíðina. Vanligar sunnudagar er Vesturkirkjan væl meira enn hálvfull og tað er ikki so lítið, tá hugsað verður um, at kirkjan tekur eini 800 fólk, sigur Heri Joensen.

Forgongur ei

Tá uppgangstíðir vóru í restini av Føroyum í 80'unum, vóru niðurgangstíðir fyri talið á kirkjugestum.

– Tá vart materialisman upp á tað hægsta, men hóast hon nú er um at náa somu hæddum, so uppliva vit ikki nakra niðurgongd, heldur tvørturímóti. Tað man vera tí at fólk eisini kenna seg hava brúk onkrum, som mølur og rustur ikki býtur á, metir Heri Joensen.

Restina av hesum árinum eru brúdleyp og nógvir dópar á skránni hjá presti, millum annað tí at útisetaføroyingar velja at doypa børn síni nú teir eru her í landinum í jólafrí, og nýggja árið hjá Hera Joensen byrjar so at siga við guðstænastu nýggjársmorgun. Av henni væntar prestur sær tó onga stóra kirkjufjøld.

– Til guðstænastu nýggjársmorgun plaga kirkjugestirnir at vera fámentir. Eg haldi at fólk hava ilt við koma úr songini so tíðliga eftir at hava sitið uppi til langt útum midnátt. Í so máta er nýggjársguðstænastan ein tann slakkasta á árinum, sigur Heri Joensen, prestur i Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷7
Nuuk	0
Qaqortoq	1
Ammassalik	÷5
Saint John's	6
Halifax	0
Reykjavík	÷1
Seyðisfjørður	÷4
Tórshavn	÷3
Lerwick	÷2
Aberdeen	0
London	2
Tromsø	÷7
Bergen	÷1
Oslo	–
Stokkhólm	÷6
Keypmannah.	0
Helsinki	÷18
Moskva	÷4
Berlin	2
Warzawa	2
Kiev	÷7
Bukarest	÷6
Paris	2
Madrid	0
Róm	10
Malorca	14
Athen	11
Malta	–
Tunis	11
Beijing	3
New Dehli	20
Bangkok	30
Jakarta	33
Sydney	–
New York	2
Miami	14
Los Angeles	16
Meksikobýur	16
Panama	27
La Paz	14
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	32

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst sunnan fyri Ísland fer eystur eftir beint snnan fyri Føroyar og aftan á tí kemur køld luft av norði inn yvir oyggjarnar.



Nýggj lágrýst koma undan Eysturgrønlandi móti útnyrðingspartinum av Noregi hava lýggjari luft við sær.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 26/12 kl. 06⁰⁰– 27/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 1,1°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,1 mm – mált frá 26/12 kl. 06⁰⁰– 27/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 65,6 mm

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

VESTFALLSKYRRINDI

21. des.: Mánin longst frá jørðini
22. des.: Fyrra kvarter
30. des.: Fullmáni
2. jan.: Mánin n. jørðini/Jørðin n. sólini

Kelda: Almanakkin 2001

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
28. des	04.33	16.57	03.33	15.57	03.48	16.12	06.33	18.57	07.33	19.57	02.48	15.12	01.48	14.12	04.48	17.12	05.48	18.12	04.18	16.42	05.33	17.57
29. des	05.22	17.47	04.22	16.47	04.37	17.02	07.22	19.47	08.22	20.47	03.37	16.02	02.37	15.02	05.37	18.02	06.37	19.02	05.07	17.32	06.22	18.47
30. des	06.13	18.40	05.13	17.40	05.28	17.55	08.13	20.40	09.13	21.40	04.28	16.55	03.28	15.55	06.28	18.55	07.28	19.55	05.58	18.25	07.13	19.40
31. des	07.07	19.34	06.07	18.34	06.22	18.49	09.07	21.34	10.07	22.34	05.22	17.49	04.22	16.49	07.22	19.49	08.22	20.49	06.52	19.19	08.07	20.34

5 707265 100050 >